Starvslýsing

# Leiðari til Verkstaðið Vón

## Farloyvisstarv

Starvið sum leiðari fyri Verkstaðnum Vón er leyst at søkja til setan 01.01.2007 ella eftir nærri avtalu. Setanin er tíðaravmarkað og endar 28.02.2008.

**Verkstaðið**
Verkstaðið Vón er vardur verkstaður fyri vaksin fólk, sum eru menningartarnað. Talan er um fólk, sum kunnu læra at arbeiða sjálvstøðugt við framleiðslu.
Tríggjar framleiðsludeildir eru á verkstaðnum. Hesar eru timburdeild, pappírsdeild og seymideild. Harumframt er kantina, sum brúkararnir eisini hava ábyrgd av.
Umleið 40 brúkarar eru á verkstaðnum. Starvsfólkini eru 13 í tali.

**Starvið**
Leiðarin hevur ábyrgdina fyri, saman við starvsfólkunum, at skipa ein tryggan og mennandi gerandisdag fyri brúkararnar. Leiðarin hevur ábyrgdina fyri dagliga rakstrinum av stovninum. Hetta umfatar fakliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd. Leiðarin fyri verkstaðnum vísir til leiðaran fyri Trivnaðartænastuna, sum er deild undir Nærverkinum.

**Um leiðaran**
Tú skalt hava eina viðkomandi útbúgving so sum pedagogur, ergoterapeutur ella líknandi. Harumframt mást tú hava hug og hegni til at arbeiða við fólki, sum hava menningartarn.
Vit vænta av tær, at tú hevur hug og hegni til at leiða, og at tú við tínum leiðsluhátti megnar at skapa trivnað og menning í starvsfólkabólkinum og á verkstaðnum sum heild.

Vit vænta, at tú hevur skil fyri roknskaparhaldi, og at tú hevur hug og áræði at leggja afturat tínari vitan tað, sum krevst, fyri at kunna røkja leiðarastarvið til fulnar.
Vit vænta, at tú ert sjónlig/ur í tínum leiðarastarvi, og at tú dugir væl at lýsa tíni sjónarmið fyri øðrum.
Endiliga vænta vit, at tú hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir, og at tú hevur evni og vilja til at samstarva við starvsfelagar og leiðslu á øllum økjum.

**Setan og løn**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Um pedagogur, ið framanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag á lønarstigunum 42, 44 og 46.

**Umsókn**
Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Jónu Olsen, virkandi deildarleiðara, á tlf 304020.

Umsóknir við próvskjølum, viðmælum og CV skulu sendast til:
Nærverkið
Meginskrivstovan
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin** er fríggjadagin 26. januar 2007.

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo










Veitst tú ikki tað?
Sosialurin







Lesið Sosialin -so eru tit við!